# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*Inna og Kristian Törnroos fingu 27. november en son. Hann vigaði 3955 g og var 51 cm langur. Familjan býr í Stockholm, men Inna er ættað úr Sørvági.*



*Leygardagin 11. desember fingu Silvia Láberg og Jan Mohr hesa fittu prinsessu. Hon vigaði 4100 gr og var 57 cm long.*

27. november fingu Karin Weihe & Lars Egehus, Holbæk, eina dóttur. Hon vigaði 3376 gr og var 52 cm. long

7. desember fingu Rini Mørk og Tórður Holm, Vági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3250 gr.

9. desember fingu Mildrid Jespersen og Erhard Nybo, Tvøroyri, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3530 gr.

9. desember fingu Annika Jacobsen og Kim Durhuus, Hósvík, ein son. Hann var 60 cm langur og vigaði 4930 gr.

10. desember fingu Oddbjørg Niclasen og Jógvan Magnussen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3630 gr.

10. desember fingu Jórun og Høgni av Skarði, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4000 gr.

11. desember fingu Karla Andreassen og Jacob Rummelhoff, Tórshavn, tvíburðar – gentur. Onnur var 50 cm long og vigaði 2700 gr, hin 50 cm long og vigaði 2700.

11. desember fingu Tórun R. og Øssur Andreasen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

12. desember fingu Tórun L. Samuelsen, Tórshavn, og Óli Hansen, Oyndarfirði, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3500 gr.

12. desember fingu Beinta og Ivan Weihe, Hósvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4050 gr.

12. desember fingu Barbara Ei. Reynheim, Tórshavn, og Wentzel F. Mouritzen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3300 gr.

13. desember fingu Tóra Holm Jacobsen og Niels Kári Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3600 gr.

13. desember fingu Ragna Dam og Fjalar Stefánsson, Norðskála, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4500 gr.

13. desember fingu Beinta Reynheim og Thomas Hjaltalin Jensen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2675 gr.

14. desember fingu fingu Mirjam Jacobsen og Jan í Nesinum, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3070 gr.

15. desember fingu Ann Mortensen og Sigtór Andreassen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2900 gr.

15. desember fingu Borgarhjørt Skálagarð, Tórshavn, og Heðin Poulsen, Ljósá, ein son. hann var 54 cm langur og vigaði 3500 gr.

15. desember fingu Anni A. Lamhauge og Sigurd L. Lamhauge, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

16. desember fingu Eydna Iversen Lindenskov og Sámal Lindenskov, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4200 gr.

## Dagurin

**18. desember. Gratianus**, deyður umleið ár 300. Biskupur í Tours í Fraklandi. Varð tikin av døgum, tá ið Diocletianus ráddi.

**19. desember. Nemesius**, deyður umleið ár 250. Um halga mannin Nemesius sigur halgisøgan, at hann einaferð varð lagdur undir stuldur. Men tá ið hann kundi prógva, at hann var ósekur, varð hann ákærdur fyri at vera kristin og tikin av døgum.

**20. desember. Ábraham.** Dagur til minnis um patriarkin Ábraham. Bíbilska navnið merkir faðir at mongum.

## Minningarorð um
# Knút S. Ellingsgaard,
## Leirvík



Árið er farið at halla og vit nærkast stytsta degi. Fólk fyrireika seg og síggja fram ímóti at halda jól saman við sínum kæru og øll tykjast at hava nógv at gera.

Í øllum meldrinum renna tankar okkara aftur til summarið, til teir ljósu og langu dagarnir við sól og góðum veðri. Men tað fær okkum eisini at hugsa um myrku skýggjini og tunga missin vit upplivdu, tá Knút eftir stutta sjúkralegu var tikin burtur.

Knút S. Ellingsgaard búði í Leirvík, hann var føddur í 1937, var giftur við Agnas, og tey áttu 4 tilkomin børn og fleiri barnabørn. Knút byrjaði at arbeiða á KJ-Hydraulik á Kambsdali miðskeiðis í nítiárunum og hevði sostatt verið her í 10 ár, nú hann doyði.

Arbeiðið hjá Knút her á virkinum var at taka sær av amboðunum í smiðjuni. Hann hevði ábyrgd av at amboðsrúmið hevði tey amboð í lagi sum maskinsmiðirnir høvdu tørv á, og harafturat var hann trygdarumboð.

Arbeiðið hjá sær røkti Knút til lítar, hann var nærlagdur og ordiligur í allari síni framferð, og øll vóru góð við Knút. Hann var so álitisvekjandi, sáttligur, sterkur og fyrikomandi.

Eisini var hann so góður at heita á, tá tað kom til ymiskt viðlíkahaldsarbeiði, ið skuldi gerast. Hann dugdi alt, var ein sjaldsama góður handverkari og fór so stillisliga at, tá ið hann gjørdi eitthvørt.

Knút gjørdist sjúkur í vár, og vit grunaðu als ikki, at hann ikki skuldi koma aftur til arbeiðis, væntaðu og vónaðu sjálvsagt at hann skuldi gerast frískur aftur, men so var ikki.

Sjúkan, sum hevði rakt hann, var so álvarslig, at hann ikki bleiv frískur, og í juli mánaða vóru boðini eftir Knút, fjørðurin var rógvin, og Harrin tók hann heim til sín.

Á virki okkara sakna vit nógv Knút, vit hava mist ein góðan arbeiðsfelaga og vin. Vit minnast hann við virðing og takksemi. Mátti Harrin styrkt tykkum, Agnas og hansara kæru, ið eftir sita við sorgini.

Ærað verið minnið um Knút S. Ellingsgaard.

**Arbeiðsfelagar á KJ-Hydraulik**

Fyri 25 árum síðan:

# Skipsføraraprógv í desember 1979



*Í desember 1979 fingu níggju skipsførarar prógv á Føroya Sjómansskúla. Teir vóru: Kári Poulsen, Tórshavn, Oddur Holm, Hvalba, Meinhard Petersen, Klaksvík, Jákup Frits Thomsen, Skála, Martin S. Kruse, Sørvágur og Poul Leivsgarð, Klaksvík. Teir sum vanta á myndini: Rasmus Feilberg, Fuglafjørður, Herman K. Joensen, Oyndarfjørður og Erland Olsen, Rituvík.*

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1980*